TING-HELLAN



*Sendinevndin er komin til Keypmannahavnar. Vinstrumegin frá: Andreas Møller, skrivstovustjóri í danska forsætisráðnum, Rikard Long, Pól Petersen, Petur Mohr Dam, Niels Arup, ráðharraskrivari, Jóhan Poulsen, Jákup Fr. Øregaard, Kristian Djurhuus og Hilbert, amtmaður. Thorstein Petersen vantar á myndini*

*Mynd úr Stjórnarskipanar málið 1946*

greiða frá, at til ber ikki at lata føroyskum myndugleikim víðar heimildir, tí hetta skal stríða ímóti ásetingini í § 19 í grundlógini um, at "Kongen handler på rigets vegne."

Ádú, tá tað bar til at "formoda" seg burturúr ásetingunum um, at bara kongur og fólkating smíða lógir, játta pengar og útinna vald, tá tað bar til hjá okkum ikki at fara uppí ES, tá tað ber til hjá ES at umboða Danmark, og tá vit vita, at danska ríkisgrundlógin í grundini ongantíð hevur handlað um valdsbýtið í ríkissfelagsskapinum - ja so átti tað eisini at borið til at latið kong verið drottning, og latið føroyskar myndugleikar umboða seg sjálvar í egnum navni á teimum málsøkjum, har føroyingar ráða.

Í hesum viðmerkingum verður skrivað um allar tær skipanir, har føroyingar hava sjálvstøðuga umboðan, at talan er um "særegne undtagelser." Eisini stendur í hesi lóg, at Føroyar og Grønland skulu semjast á teimum økjum, har Føroyar og Grønland í felag umboða ríkið. Hetta ber sjálvsagt heldur ikki til at ganga undir.

Tað er eisini brot á heimastýrisskipanina at leggja fram á fólkating uppskot um grønlendsku heimildirnar, ið beinleiðis hevur ásetingar um Føroyar og óbeinleiðis fær týdning fyri okkum, uttan at hetta uppskot fyrst er samtykt sum ríkislógartilmæli í Føroyum.

Í øllum førum átti grønlendska lógin at bíða eftir teirri føroysku.

Loksins skulu vit nú ganga undir, at vit skulu eita "Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne." Hann náði tú meg! Tað velst um hvørt høvi og høpi sær, hvussu vit skulu kallast. Í altjóða sjórættarfelagskapinum, IMO, eita vit td. The Faroe Islands, Denmark.

### Hvat kundu vit hugsað okkum?

Uppskotið sum tað liggur nyttar valla at tveita burtur. Afturfyri eittans stykki, ið staðfestir verandi støðu, mugu vit lata allar hinar ásetingarnar, umframt viðmerkingarnar. Vána úrslit.

Í staðin áttu vit at biðið um:

- Sáttmála ella seming um uttanríkisheimildirnar hjá Grønlandi og Føroyum
- At hesin varð fráboðaður øðrum londum
- At hesin staðfestir, at vit gera avtalur í egnum navni á egnum málsøkjum
- At Danmark hevur skyldu at taka fyrivarni fyri Grønlandi og Føroyum í øllum altjóða sáttmálum, ið viðvíkja málsøkjum, sum eru yvirtikin ella eyðvitað kunnu yvirtakast.
- At allir sáttmálar skulu leggjast fyri tingini í Grønlandi og Føroyum fyri at fáa gildi
- At Danmark skal virka fyri, at allir altjóða stovnar, ið eru Grønlandi og Føroyum viðkomandi, sambært viðtøkum sínum skulu kunna taka upp lond sum okkum sum limir ella atlimir



*Atli P. Dam, løgmaður, og Poul Schlüter, forsætisráðharri, hava júst undirskrivað avtaluna um yvirtøku av málsøkinum ráevni í undirgrundini*

*Mynd úr Løgtingið 150*

Sjálvsagt er, at partarnir hvør í sínum lagi kunnu hava egna fatan av, hvussu alt hetta ber til, egna fatan av tí, ið Anders Fogh nevndi teir teoretisku spurningarnar.

Vit áttu at boðið donskum tingfólkum til Føroya at viðgjørt hesar spurningar, umframt at vit áttu at viðgjørt hesi mál og miðlar alment her heima. Tað var skeivt lagt til rættis at lata embætisverkini togast um uttanríkisheimildirnar. Tað er eisini at undrast á, vit tykjast hava ta støðu, at vit skulu hyggja út ígjøgnum vindeygað og látast sum onki, tá danir nevna grundlógina.

Tað er tvass at siga, at vit ikki hava viðurkent grundlógina. So ella so hava vit viðurkent, at hon er har, og at hon sigur okkum, hvørjar stovnar vit hava hinumegin borðið og hvørjar hemildir teir hava. Á sama hátt sum føroyingar ofta duga betur at stava danskt enn danir sjálvir, so áttu vit eisini at kent grundlógina betur enn danir og kunna víst teimum á, at fyri tað fyrsta er grundlógin fyrst og fremst stýrisskipanarlóg Danmarkar - hon hevur ongar beinleiðis reglur um ríkisstøðuna - og fyri tað annað er tað í øllum førum næstan púra frítt fyri hjá fólkatinginum at tulka grundlógina hvønn veg, tað skal vera.

Tað má tí "formodast" at vit kunnu smíða eina nøktandi skipan í góðum samsvari við grundlógina.